# Geeeeeee-Íííííííí

*Unga HB liðið megnaði ikki at liva upp til favoritt heitið, meðan GÍ leikararnir gjørdu alt tað teir kundu, til tess at vinna sær sætið í Europa komandi ár, og so kundi tiltikna HB rópið verða skift út við omanfyristandandi*



JÁKUP MØRK

HB-GÍ 0-1 (0-1)

Undan ársins útgávu av finaludystinum um løgmanssteypið, vóru mong, sum mettu HB sum stórfavoritt at vinna dystin.

Skuldi metast eftir støðuni á stigatalvuni, var sum so heldur einki at ivast í, at so var. HB er í løtuni á fremsta sessinum í landskappingini, meðan GÍ heldur skuffandi er heilt niðri á sjeynda plássi.

Avrikini hjá gøtumonnum hava heldur ikki verið sannførandi í fleiri av landskappingardystunum. Í steypakappingini eydnaðist tað við bit og slit at basa vágamonnum í hálvfinaluni, men tey flestu mundu tó rokna við, at her fór positiva gongdin at steðga, tí HB mundi verða teimum ein ov stórur biti at gloypa.

**Royndirnar telja**

Eitt, sum gøtumenn tó áttu fram um HB liðið, mundi vera drúgvu royndirnar, sum ofta eru so týdningarmiklar í slíkum dystum.

Sæð í bakspeglinum mundi tað eisini vera júst hetta, sum gjørdi, at GÍ í dag kann kalla seg steypavinnara 2000.

Tað var nevnliga skjótt greitt, at HB liðið als ikki spældi upp til sítt besta henda dagin, og serliga vóru tað fleiri av ungu leikarunum, sum ikki vóru eins eyðsýndir, og teir vanliga hava verið.

Í vinstru riggaði samspælið millum Pætur Dahl og Janus Joensen als ikki so væl, sum tað hevur gjørt higartil í ár, og Pætur hevði einki av teimum gjøgnumbrotunum, sum hann so ofta hevur sýnt.

GÍ liðið tóktist hinvegin at spæla eins og talan var um ein heilt vanligan landskappingardyst. Líkt var ikki til, at leikararnir á nakran hátt vóru nervaðir av týdninginum av dystinum, tó at tiltikni stríðsviljin hjá gøtumonnunum var sjónligari enn vit hava sæð higartil í ár.

Teir vóru snøgt sagt nógv grammari enn havnarmenninir, teir vunnu flestu nærdystirnar, fluttu seg meira, og yvirhøvur vóru teir oman á fyrstu trý korterini.

Royndirnar móti málunum báðum vóru tó ikki so nógvar. Bárður Mortansson hevði eina vandamikla frísparksroynd, meðan tað einar tvær ferðir gjørdist vandamikið framman fyri HB málið. Fyrru ferð, tá Helgi stútaði upp um eftir frísparksinnlegg, og aðru ferð, tá Magni royndi seg við langskoti, sum Bárður akkurát fekk jústað upp um málið.

**Málið líktist permuni**

Á permuni á leikskránni hendan dagin, var mynd av Óla Hansen og Símun Eliasen, meðan hesir báðir stríddust um ein bólt.

Tilvitað var tað neyvan, men einasta málið í dystinum líktist í rættuliga stóran mun permumyndini. Ein høgur bóltur varð sendir móti HB verjuni, og bæði Hans og Símun stóðu skeivt plaseraðir, soleiðis at bólturin støkk niður í svørin og upp um verjuleikararnir. Óli Hansen elti bóltin allan vegin, og hóast hann var kroystur av báðum miðverjunum, so eydnaðist tað honum við einum dómadagsskoti at senda bóltin í meskarnar.

HB leikararnir iðraðu seg uttan iva, tí talan var um ein heldur óneyðugan møguleika, sum Óli fekk. Tað skal tó ikki takast frá málskjúttanum, at talan var um eitt rættuligt »forwardmál«. Uttan stórvegis himpr, smekkaði hann til, og mál er jú tað, sum alt snýr seg um hjá einum áleypara.

**HB vaknaði**

Sum nevnt omanfyri, so vóru gøtumenn omaná í øllum lutum fyrsta partin av dystinum.

Møguliga komst hetta av, at leikararnir vóru nakað tyngdir av trýstinum, sum lá á teimum undan dystinum. Líka mikið um hetta var so ella ikki, so loysnaðu í øllum førum nakrir teymar, eftir at GÍ hevði lagt seg á odda, og seinastu løtuna av fyrra hálvleiki fekk HB nakað, sum líktist einum trýsti á GÍ málið, tó uttan at hetta gav nakran rættuligan málmøguleika av sær.

Seinna umfarið tóktist tó beinanvegin greitt, at HB nú hevði fingið eitt nógv betri tak um dystin. I hálvleikinum høvdu teir býtt Pætur um við Gigi, og hetta setti beinanvegin nógv meira ferð á HB spælið.

Lítli rumenin treivst sera væl á grasinum, og fleiri ferð skapti hann ólag í GÍ verjuni, tá hann við kviku snaringum sínum, ella skjótum 1-2 spæli royndi at koma ígjøgnum verjuna. Kropsvøkstur hansara hevði tó við sær, at hann so at siga hvørja ferð varð steðgaður í avgerandi løtuni, men tað skerst ikki burtur, at hann veruliga prógvaði, at hann kann gerast ein styrkur hjá HB eftir summarfrítíðina.

Besta møguleikan mundi HB tó fáa, miðskeiðis í seinna hálvleiki. Jóhannis slapp sær ígjøgnum í høgru, og tá bólturin varð sendir inn fyri, stútaði Andrew sera hegnisliga, men bólturin tók í undirsíðuna av tvørstongini, og støkk síðani út aftur í spæl.

**Fastfryst spæl**

Móti endanum av dystinum gjørdist fortreytirnar hjá HB fyri at leggja trýst á GÍ enn betri. Helgi L. Petersen var áhaldsin, og í royndini at takla Janus Joensen, leyp hann á aftan ífrá, og so var dómurin eirindaleysur. Reytt kort, og GÍ skert við einum manni.

Hetta broytti tó ikki so nógv um spælið hjá HB, og yvirhøvur kann ein undrast á, at teir alla tíðina hildu so konsekvent fast við somu spæliætlan. Ikki fyrr enn seinastu tveir minuttirnar ella so varð víkt frá 4-4-2 skipanini, hóast tað tóktist upplagt at flyta antin Símun ella Hans niðan í álopið. Um ikki annað fyri at skapa meira tyngd í.

Heldur ikki tær útskiftingar, sum vórðu framdar, tóktust viðføra, at HB liðið gjørdist meira álopssinnað. Gamaní, so bøtti fyrsta útskiftingin nógv um spælið, tí Pætur var als ikkis í hopla henda dagin. HB liðið gjørdist als ikki meira álopssinnað av, at Ingi Rasmussen kom á vøllin fyri Hall Danielsen, ella at Jón Rói varð settur í álopið fyri Bárð.

Tá vildi tað verið meira upplagt at sett Inga á verjukenda miðvøllin, tikið Janus út, og broytt spælskipan, soleiðis at Rúni og Rói gjørdist meira frígjørdir í framrættaða spælinum. Annar møguleiki hevði verið, at sett Jón Róa inn fyri ein miðvallara, so HB seinastu løtuna leikti við trimum áleyparum.

Nú er altíð lætt at vera eftirklókur, men tað er nú einaferð soleiðis, at tá spælt verður í eini steypafinalu, so mást tú satsa, um tú ert aftan fyri. At tapa við einum ella tveimum málum er so fullkomulia líkamikið.

**GÍ var betri**

Øll henda skrivingin um, hvat HB gjørdi rætt ella skeivt, skal tó á ongan hátt skiljast sum ein niðurgering av avrikinum hjá GÍ.

Leikararnir sýndui, at hóast teir ikki spæla sama ágangandi fótbólt, sum teir fyrr hava gjørt, so vita teir framvegis hvat skal til.

Í flestum lutum vóru teir tað lítla pettið hvassari enn mótstøðumenninir, og yvirhøvur spældur teir skilabetri. Vóru umstøður til at spæla róliga niðaneftir, so varð hetta gjørt. Skuldi bólturin bara vekk, so varð hetta gjørt. Ja, yvirhøvur høvdu teir tamarhald á dystinum teir allarflestu av teimum 90 minuttunum, sum vórðu leiktir.

At enda skal nevnast, at GÍ eisini átti besta leikaran hendan dagin. Magni Jarnskor stríddist fyri fleiri í samfullar 90 minuttir, og hetta var eisini viðvirkandi til, at reyða kortið hjá Helga ikki fekk nakran serligan týdning. GÍ liðskiparin setti bara ferðina enn meira upp, og so var tann trupulleikin loystur.

»GÍ er nakað heilt fyri seg« varð sungið eftir dystin, og hesum kunnu vit bara geva fegnu viðhaldsfólkunum rætt í. Liðið, sum hevur myndað toppin av føroyskum fótbólti var av mongum avskrivað, tá vit komu út í juni mánað, og hóast teir neyvan verða føroyameistarar, so hava teir enn einaferð víst, at undrið í Gøtu langt ífrá er liðugt.

Finala um løgmanssteypið
**HB-GÍ 0-1 (0-1)**
0-1: Óli Hansen

Reytt kort: Helgi L. Petersen, GÍ

Dómari: Suni Johansen

**HB:**
Báråur Johannesen – Jóhannis Joensen, Hans á Lag, Símun Eliasen, Janus Joensen – Hallur Danielsen, Rúni Nolsøe, Rói Árting, Pætur Dahl – Bárður Mortansson, Andrew av Fløtum

**GÍ:**
Sunnvard Joensen – Pól Ennigarð, Bartal Eliasen, Martin Thomsen – Leivur Hansen, Magni Jarnskor, Pauli Jarnskor, Helgi L. Petersen, Henning Jarnskor – Óli Hansen, Súni Olsenm



*Jú. Gleðin var stór, tá tað endiliga varð greitt. GÍ er steypavinnari 2000*
***Mynd: Jan Müller***



# Frøðin var stór á Tórsvølli sunnudagin







## Sjálvsagdur sigur

*Um hugt varð eftir hagtølunum fyri EM-endaspælið, so var einki at ivast í, at Frakland skuldi gerast europameistari*

JÁKUP MØRK

Mongu vóru helst tey, sum roknaðu Italia fyri at vera europameistarar, tá tað bert restaðu fá sekund av EM-finaluni.

Fyri søgugranskararnar, var tó ongantíð nakar ivi, tí um hugt verður at yvirlitinum niðanfyri, so varð langt síðani stungið í kortið, at tað skuldi verða Frakland, sum fór avstað við sigrinum. Ja longu í 1992 vóru fyrstu ábendingarnar um, at tað skuldi ganga sum tað gekk

**2000**
- Frakland vinnur EM-finaluna.
- Mótstøðuliðið í finaluni, Italia, vinnur hªálvfinaluna við brotssparkskapping.
- Frakland vinnur sína hálvfinalu við einum máli móti Portugal eftir longda leiktíð. Avgerandi málið skjýtur nr. 10, Michel Platini.
- Fyrsti dysturin hjá Fraklandi, móti Danmark, endar við fronskum sigri.

**Fýra ár frammanundan, 1996**
- Týskland gerst europameistari
- Mótstøðuliðið hjá Týsklandi er Kekkia, sum heldur óvæntað hevur vunnið seg fram til finaludystin
- Talið av liðum í endaspælinum verður tvífaldað, úr 8 í 16

**Átta ár frammanundan, 1992**
- Fullkomuliga óvæntað gerst Danmark europameistari
- Í finaludystinum vinnur Danmark á Týsklandi, sum tá var heimsmeistari
- Í hálvfinaluni vinnur Danmark á Hollandi

**1984**
- Frakland vinnur EM-finaluna
- Mótstøðuliðið í finaluni, Spania, vinnur hálvfinaluna við brotssparkskapping.
- Frakland vinnur sína hálvfinalu við einum máli móti Portugal eftir longda leiktíð. Avgerandi málið skjýtur nr. 10, Zinedine Zidane.
- Fyrsti dysturin hjá Fraklandi, móti Danmark, endar við fronskum sigri.

**Fýra ár frammanundan, 1980**
- Týskland gerst europameistari
- Mótstøðuliðið hjá Týsklandi er Belgia, sum heldur óvæntað hevur vunnið seg fram til finaludystin
- Talið av liðum í endaspælinum verður tvífaldað, úr 4 í 8

**Átta ár frammanundan, 1976**
- Fullkomuliga óvæntað gerst Kekkia europameistari
- Í finaludystinum vinnur Kekkia á Týsklandi, sum tá var heimsmeistari
- Í hálvfinaluni vinnur Kekkia á Hollandi



*Pauli við steypinum og soninum, Magnusi*
***Mynd: Jan Müller***

## Nokk til eitt lið

*Pauli Jarnskor kundi fyri 11. ferð fáa gullmerki hongt um hálsin sunnudagin*

JÁKUP MØRK

Hóast hann hevur roynt tað fleiri ferðir áður, so var gleðin hjá elsta jarnskorinum eins stór og fyrstu ferð eftir steypasigurin sunnudagin.

**Nóg mikið til eitt lið**

Við ikki sørt av stoltleika kundi veteranurin boða frá, at hetta var gullmerki nummar ellivu, sum hann hevði vunnið við GÍ liðnum. Onkur vildi kanska sagt, at hetta er reyp, men um so er, so hevur hann í øllum førum nakað at reypa av.

**Viljin og royndirnar**

Tá ein hevur roynt so nógv og vunnið so nógv, er tað ofta soleiðis, at mettan kemur fyrr ella seinni, men soleiðis tykist ikki vera í Gøtu. Spurdur, hvussu teir bera seg at við framhaldandi at vinna, svarar Pauli, at tað týdningarmesta í hesum er viljin.

- Kanska hevði tað eisini nakað at siga, at vit hava fleiri royndir enn HB liðið, tí báðir partar vóru undir trýsti undan dystinum, heldur Pauli.

Hann helt tó, at GÍ hevði gott tak á fyrra hálvleiki, men undraðist samstundis á, at HB byrjaði við Gigi á beinkinum. – Tað broytti nógv, tá hann kom á vøllin, men it kláraðu so at halda tørn.

**Bjargað árinum**

Í ár hevur annars ikki gingið eftir vild hjá GÍ, og Pauli ásannaði eisini, at steypasigurin at kalla hevði bjargað árinum.

- Vit hava eitt klokkuklárt mál, sum er at tryggja okkum europeiska luttøku, so í so máta hava vit nú tryggjað okkum, greiðir veteranurin frá. Hann leggur tó dent á, at hetta ikki fær teir at taka sær av løttum, tá kappingin verður uppafturtikin eftir summarsteðgin:

- Nei, vit ætla okkum so avgjørt at standa okkum betri seinnu helvt, og so leingi, sum vit kunnu, so ætla vit at koma longur fram, sigur Pauli Jarnskor at enda.